# Gamli Handil í Heiðunum

Í Mentanarvikuni verður søluframsýning í Gamla Handli í Heiðunum, í døgunum 28 okt. – 04. nov. Serliga hugnaligt er um heyst- og jóltíðir í Gamla Handli í Heiðunum. Í ár hava tær tríggjar prýtt væl um Gamla Handilin, við fjálgum seyðaskinnum, livandi ljósum og vøkrum prýðislutum. Alsamt fleiri koyra tálgina, hornini og skinnini burtur. Tí hava Elin lindenskov, Eva úr Dímun og Eydna Gaard tikið stig til at samla teirra tilfar saman til eina framsýning. Elin Lindenskov sýnir fram livandi ljós og sápur gjørdar úr tálg, Eva úr Dímun vísir garvaði seyðaskinn úr Dímun og Eydna Gaard vísir smúkkur, lampur og aðrar prýðislutir úr hornum og kleyvum.





Nógva varð gjørt burtur úr 40 ára haldinum á Zarepta



Eldra leguhúsið við Merkinum í húnar hátt



Jon í Skemmuni, annar av leiðarunum á Zarepta, fær handað gávubræv frá felagskommununi í Vágum og Føroya Landsstýri

# 40 ár í Vatnsoyrum

**Umboð fyri Føroya Landsstýrið og kommunurnar vesturi í Vágum, bóru fram kvøður til Zarepta á 40 ára degnum**

ZAREPTA
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*
*Myndir: Heri Simonsen*

Mong nýttu høvið at støkka inn á gólvið á Zarepta vesturi í Vatnsoyrum til 40 ára hátíðarhaldið farna leygardag. Til bar hjá fólki at síggja myndir, og nøkur filmsbrot frá teimum 40 árunum, sum eru liðin síðani barnalegurnar hjá brøðrasamkomunum fluttu úr Sundalagnum, og vestur í Vágar. Tvey tey fyrstu árini vóru legurnar við Áir. Nakrar myndir vóru eisini frá hesum tíðarskeiðnum. Tað bar eisini til at síggja útklipp frá ymiskum bløðum, og onnur brot, sum hava samband við søguna hjá Zarepta. Elisabeth og Guttorm Mortensen í Hoyvík hava skipað fyri hesi áhugaverdu framsýning.

### 6.000 kr. í 1965

Klokkan 14 var ein hátíðarløta í møtisalinum á Zarepta. Ein maður er eftir á lívi, sum sat í fyrstu nevndini fyri Zarepta. Talan er um Martin Nielsen úr Vatnsoyrum, sum mangir føroyingar kenna frá kommunalpolitikki. Martin greiddi m. a. frá, at grundstykkið, sum bleiv útvegað til Zarepta í 1965 var 10.500 fermetrar. Kostnaðurin tá í tíðina var 6.500 kr. Kanska ein hin besta myndin av hvussu nógv tað føroyska samfelagið er broytt hesi 42 árini. 6. oktober 1965 fór arbeiðið í gongd. Ongar maskinur vóru tøkur til arbeiðið. So talan var um eitt stórt tak. Veturin 1965-66 byrjaðu menn at stoypa. Hesin veturin var sera baldrutur. Onkuntíð sást á botn í pengakassanum, men verkætlanin hóraði kortini undan, og ongantíð kom steðgur í arbeiðið. Í februar 1967 blivu leguhúsini innilokað.

### Fortíð og framtíð

Umboðini fyri Føroya Landsstýrið og Felagskommununa vesturi í Vágum: Jógvan á Lakjuni og Jógvan Olsen handaðu Zarepta tvær stórfingnar peningagávur. John í Skemmuni takkaði vegna Zarepta fyri hesar stórfingnu gávur. Í síni egnu røðu kom John í Skemmuni inn á, at tað er ein stór fjøld, sum heldur Zarepta koyrandi. Bæði gjøgnum sjálvboðið arbeiðið, gávur og bøn. John fortaldi, at verða heystlegurnar taldar við, so hava á leið 1.400 børn og ung verið á legu á Vatnsoyrum, her í 2007. Roknar ein aðrar legur uppí, umframt tey, sum hava verið starvsfólk til tær ymsu legurnar, so gerst talan um umleið 4.500 fólk, sum hava verið á Zarepta, bara í ár. John nam eisini við framtíðina. Ætlanin er at byggja eitt hús norðanfyri yngra bygningin, sum er frá 1977. Hetta triðja leguhúsið skal nýtast til gentukømur. Tá tann ætlanin er førd út í lívið, er ætlanin, at bygningurin frá 1967 skal nýtast til starvsfólkini. Arbeitt verður eisini við at bøta um parkeringsviðurskiftini, sum ofta eru ein trupuleiki á Zarepta. John segði, at tey mintist aftur í tíðina við takksemi, og at tey sóu frameftir við treysti. Sjálvur hevur John í Skemmuni havt ábyrgdina fyri Zarepta síðani 1988. Í dag hevur hann ábyrgdina saman við Kirstin Samuelsen úr Fuglafirði.

### Mentamálaráðharrin aftur á slóðina

Jógvan á Lakjuni helt av givnum orsøkum eina rættuliga persónliga røðu. Hann nam við øll tey góðu minnir hann hevur frá Zarepta. Hann bar uppá mál, at í hansara familju hevur Zarepta havt týdning fyri fýra ættarlið. Fyri foreldrini hjá sær. Fyri seg og konuna, og fyri børnini og barnabørnini. Mentamálaráðharrin mintist væl tær fyrstu legurnar, sum vóru við Áir í 1965. Hann gav áhoyrarnum eina ímynd av hvussu langt Vágar og Vatnsoyrar vóru burtur frá heimbygdini, Fuglafirði í 1965. Men, at tað var gott, at tey sum brendu fyri hugsjónini, um eitt leguhús á Vatnsoyrum hildu fast, og framdu ætlanina í verki. Ógvuliga fá av bygdarfólkum hansara høvdu verið vesturi í Vágum, og tíansheldur í Vatnsoyrum í 1960-unum. Tá teir vóru á legu við Áir blivu teir tíðum vaktir mitt um náttina, tí tá fóru menn at opað hval á gomlu hvalastøðini við Áir. Hann mintist gamla hvalabátin "Sumba". Jógvan á Lakjuni mintist eisini, at legubørnini gingu skrúðgongu til Hvalvíkar har tey svumu. Mentamálaráðharrin bar eisini uppá mál, um tann stóra sangskattin børnini, og tey ungu hava fingið lut í, á legunum vesturi á Zarepta. Jógvan á Lakjuni vísti eisini á týdningin, at tey sum starvast á Zarepta geva teimum ungu ein mentunarligan førning, og læra tey at fara um føroysku náttúruna.

### Heilsa frá løgmanni

Løgmaður, Jóanes Ejdesgaard hevði ikki tíð og umstøður at verða vesturi á Vatnsoyrum leygardagin. Kristianna S. Jacobsen frá Løgmansskrivstovuni bar fram heilsu, sum løgmaður hevði ritað. Í heilsanini segði løgmaður, at barna og ungdómsarbeiðið á Zarepta var eitt tekin um eitt ótroyttiligt arbeiðið og støðufesti. Og at arbeiðið hevði stóran týdning, og átti ikki at verið undirmett. Løgmaður segði eisini í heilsanini, at økið á Vatnsoyrum er sera væl valt. Løgmaður vísti somuleiðis á hvussu týdningarmikið tað er, at børnini og tey ungu læra um næstrakærleika og samstarv. Og at tey menna sítt andaliga og sosiala tilvit. Fólkini sum standa aftanfyri Zarepta eiga eina stóra tøkk uppiborna, fyri tað verk tey fremja. Eftir hátíðarløtuna var farið oman í matarhøllini, har fólk kundu fáa eitt gott ábit. Her nýttu onnur fólk høvið at bera fram heilsu til Zarepta. Tað einu løtuna var rokað við fólki. Fleiri hundrað fólk nýttu høvi at vitja Zarepta í samband við 40 ára hátíðarhaldið. Klokkan 17 var ein sangløta í møtisalinum, sum eisini var væl vitjað.